# Minnis-listi

www.brudleyp.fo

## 12 mánaðir áðrenn ella skjótast gjørligt:

- ☐ Áset brúdleypsdagin
- ☐ Keyp/ger og send t.d. "Save the date"-kort út til tey, tit ynskja at hava við til brúdleypið
- ☐ Bílegg tíð í kirkjuni/samkomuhúsinum/býráðsskrivstovuni
- ☐ Bið um frí frá arbeiði
- ☐ Bílegg høli/telt til veitsluna
- ☐ Bílegg catering/kokk
- ☐ Bílegg tænarar, borðbúnað, borð, stólar (um tað ikki fylgir við hølinum ella matinum)
- ☐ Bílegg brúðarbil
- ☐ Bílegg brúðarfotograf (og avtala júst hvat hann/hon skal vera við til at taka myndir av)
- ☐ Fyrireika hvar tit skulu sova á brúðarnáttini (evt. bíleggja svitu á hotelli e.t.)
- ☐ Bílegg tónleikarar/DJ/undirhald til vígslu og veitslu
- ☐ Bílegg ein orðstýrara/konferencé
- ☐ Bílegg frisør (eisini royndaruppsetan)
- ☐ Bílegg dúkar
- ☐ Bílegg borðprýði (t.d. stakar, vasar, borðløbarar e.t.)
- ☐ Bílegg tíð til brúðarmakeup (eisini royndarmakeup)
- ☐ Bílegg tíð til negl, vakurleikasalong e.t.
- ☐ Bílegg videograf
- ☐ Ger eina fíggjarætlan (t.d. í Excel – sí okkara dømi her)
- ☐ Bílegg tíð til at royna brúðarkjóla (ella leita/keypa)
- ☐ Avtala venjingarætlan við teg sjálva/n ella við hjálp frá venjingarstøð
- ☐ Skriva eitt "save the date" í brúðarkalendaran á brudleyp.fo (tvs. bert brúdleypsdato + mynd – um tit ikki vita stað, tíð o.a. enn)
- ☐ ________________________________
- ☐ ________________________________

## 6 mánaðir áðrenn:

- ☐ Finn endaliga brúðarkjólan, skógvar og tilhoyr
- ☐ Keyp/bílegg klæðir og skógvar til brúðgómin
- ☐ Bílegg/keyp brúðarringar og avtala møguliga gravering
- ☐ Bílegg ella keyp reyðan løbara
- ☐ Avtala t.d. brúðarbørn og klæðir til tey
- ☐ Bílegg møguliga tíð til skræddara til tilrættingar
- ☐ Bílegg menu'ina til veitsluna
- ☐ Bílegg brúðarkøkuna
- ☐ Bílegg evt. brúðarferð (og minst til møguligar vaccinatiónir, visum og navnabroyting í passunum)
- ☐ Ger t.d. eina brúðarsíðu ella bólk á facebook viðv. kunning um tykkara brúdleyp
- ☐ ________________________________
- ☐ ________________________________

# *Minnis-listi*

www.brudleyp.fo

## 4 mánaðir áðrenn:

☐ Byrja t.d. uppá ein ynskilista

☐ Avtala ein at hava ábyrgdina av gávunum

☐ Avtala tvey vitni (tá tað er borgarlig vígsla)

☐ Um møgulig serogn skal gerast, tosa tá við sakførara

☐ Keyp ella ger t.d. innbjóðingarkort, borðkort, menukort og møgulig takkarkort

☐ Bílegg tíð til møguliga tilrættan av brúðarkjóla/klædningi

☐ ______________________________

☐ ______________________________

## 3 mánaðir áðrenn:

☐ Uppdatera lýsingina á brúðarkalendaranum á brudleyp.fo (tvs. um tit nú vita stað, tíð o.a.) og vel um brudleyp.fo eisini skal koyra lýsingina í bløðini ella ikki

☐ Send innbjóðingarnar út (ella kunna um tað er vælkomst osfr.)

☐ Venji brúðarvalsin – t.d. venjingartímar um neyðugt

☐ Keyp møguligar smykkur, lingeri, "strømpebånd" o.t.

☐ Samskipa t.d. gisting fyri gestir

☐ Avtala barnaansing til brúðardagin/-náttina og gjarna eisini dagin fyri, um tit sjálvi skulu vera við til at gera klárt

☐ Ger eina tíðarætlan fyri brúðardagin og send hana til tykkara orðstýrara/samskipara

☐ Deil ymisku uppgávurnar út til familju og vinir

☐ Bílegg brúðarbukett, knapholsblómur, borðblómur/dekoratiónir og blómur til kirkjuna

☐ ______________________________

☐ ______________________________

## 2 mánaðir áðrenn:

☐ Kanna klæðini til brúðgómin, um nakað skal tillagast

☐ Fyrireika tína talu/sang

☐ Kanna/avgerð stað/støð til myndatøku á brúðardegnum (eisini okkurt gott "plan-B" stað, um tað t.d. fer at regna)

☐ Finn inspiratiónsmyndir til hvørjar brúðarmyndir tit ynskja at fáa tiknar og ger gjarna ein lista yvir, hvat tit heilt víst ynskja mynd av

☐ Ger/bílegg sanghefti

☐ Keyp drykkjuvørur til borðhaldið/dansin (um tað ikki fylgir við hølinum)

☐ Fyrireika teg til tann stóra dagin við nokk av svøvni og evt. venjing – tó uttan at stressa

☐ Tosa við prest/borgarstjóra um hjúnarváttan og annað, sum møguliga skal avtalast áðrenn.

☐ ______________________________

☐ ______________________________

# Minnis-listi



## 1/2 – 1 mánað áðrenn:

- ☐ Avheinta brúðarringarnar, um tað ikki er gjørt.
- ☐ Gjøgnumgang tilmeldingarnar/svarini uppá innbjóðingarnar og skriva endaliga gestalistan (t.d. á excel)
- ☐ Ger eina borðætlan og borðuppstillan
- ☐ Ger/keyp bíløgdu borðkortini
- ☐ Upplýs tað endaliga gestatalið til veitsluhøli, kokkin og ábyrgdartænaran. Gjarna skriftligt, so eingin misskiljing verður
- ☐ Keyp t.d. morgungávu
- ☐ Keyp gestabók, um tit ikki eiga frammanundan
- ☐ Veksla pening til brúðarferð – um farið verður á brúðarferð
- ☐ Avtala nærri við prestin/borgarstjóran sjálva vígsluna. Vel møguligar sálmar og spyr um prýði av kirkjuni og um reglur viðv. fotografering/video. Og avtala nær tit undirskriva hjúnabandsváttan
- ☐ ________________________________
- ☐ ________________________________

## 1-7 dagar fyri brúdleypið:

- ☐ Pakka tasku við vanligum klæðum, toilet-tingum o.ø. til at gista brúðarnáttina
- ☐ Avheinta/keyp alt, sum skal leigast/keypast (t.d. dúkar, serviettar, borðbúnað, borð-/hølisprýði o.a.)
- ☐ Dekka borðini, legg borðkortini
- ☐ Farið ígjøgnum dagsskránna fyri brúdleypsdagin og farið tíðliga til songar – hvør sær
- ☐ Minst til tey smáu, hentu tingini í brúðartaskuni: Makeup – t.d. lipgloss – putur, og onnur møgulig "damuting"
- ☐ Kanna veðrið (verður tørvur á hitalampum, skiftiskóm, jakka e.l., regnskjól o.a.)

Avtala við familju og vinir, hvør tekur sær av fylgjandi:

– At taska við skiftiklæðum og ymiskum møguliga skal handast til tað staðið, har tit skulu gista

– Barnagentan (daddan ) skal upplýstast um, hvussu nógv børn hann/hon skal ansa eftir. (Ella hava eftirlit við)

– At skriva niður, hvør gevarin er og hvat innihaldi er og eisini fyri blómur

– At koyra brúdargávurnar heim til tykkum (antin beinanvegin ella tá veitslan er liðug – um tit gista aðrastaðni enn heima)

– At avheinta brúðarbukett og knappholsblómur hjá blómuhandlara

– At gera eitt endaligt eftirlit um borðætlanin er hildin (t.d. um tóm pláss eru, ella um onkur er møttur upp, sum ikki var tilmeldaður ella bert er "dottin ímillum")

- ☐ ________________________________
- ☐ ________________________________

# *Minnis-listi*

www.brudleyp.fo

**Aftaná brúdleypið:**

☐ Senda takkarkort og/ella lýsing í bløðini

☐ Gjalda tær seinastu rokningarnar

☐ Kunna um navnabroyting (M.a. hesi støðini: Bankanum, SEV, TAKS, Tryggingarfeløgum)

☐ ________________________________

☐ ________________________________

Sigið okkum endiliga frá á brudleyp@brudleyp.fo, um tit hava okkurt, sum tit halda átti at verið á listanum ella verði broytt.